# Rús- og roykfrítt tilboð til ung

**Foreldrabólkurin aftanfyri Kom og dansa fyri ung, leggur stóran dent á, at dansurin fer fram í rús- og roykfríum umhvørvi. Dansað verður mánakvøld í Platform**

DANSUR
*Ingrid Bjarnastein*



*Foreldrabólkur skipar fyri dansi í Platform fyri rús- og roykfrí ung*

Dansimøguleikarnir hjá ungum í Tórshavn eru vánaligir, men nú er møguleiki fyri at dansa í Platform hvørt mánakvøld.

Tilboðið er til teirra, sum eru millum 13 og 17 ár. Tað vil siga, til tey, sum ganga í 7-10 flokki og fyrsta árið á miðnámsskúlunum.

Dansað verður ímillum klokkan 19.30 tveir tímar fram í royk- og rúsfríum umhvørvi. Eisini hevur umboð fyri felagið Dansifrøi verið við fyri at leggja lag á.

Eisini skipar foreldrabólkurin fyri dansiskeiði, har undirvíst verður í Rock´n Roll, linju dansi og øðrum, við Miu Cameron. Hip Hop verður dansað við Katrin Dal Christiansen. Tónleikurin er sera fjølbroyttur. Alt frá diskotektónleiki til Rock´n roll verður spælt.

Byrjað varð uppá hetta tiltakið í mars mánaða, og síðani var Anna Kirstin av Tvøroyri og undirvísti í Losjuni í apríl mánaða. Skipað varð eisini fyri breakdansi við kapping.

Tað kostar 40 krónur at vera við, og møguleiki er eisini at keypa okkurt leskiligt. Lýst verður hvørjaferð dansað verður í bløðunum undir teignum, ið eitur Dansur í bløðunum. Eisini eru uppsløg á skúlagongd og ymsa aðrastaðni í Havn.

Fyrireikararnir vóna at síggja nógv rús- og roykfrí ung nú mánakvøldið í Platform.

Eldraøkið í Runavík:

# Fyrstu 10 kommunalu plássini

**Runavíkar Kommuna hevur nú keypt Føroya Vistarheim, sum liggur við Toftavatn í Runavík**

ELDRAØKI
*Ingrid Bjarnastein*



*Marja Lamhauge, formaður í sosialu nevnd í Runavíkar kommunu, sigur, at vistarheimið helst letur upp seinast í hesum árinum ella fyrst í næsta ár*

Vistarheimið í Runavík er nú selt kommuni, og fer kommunan tí at yvirtaka heimið og gera tað til eitt kommunalt vistarheim við 10 teimum fyrstu bújplássunum til eldri fólk.

Runavíkar kommuna er afturúrsigld tá tað kemur til eldraøkið. Ongi búpláss ella sambýli eru til tey eldru í kommununi. Eitt ellisheim liggur í Runavík, men tað er eitt ellisheim fyri alla oynna, og er vistarheimið nú fyrsta stigið á leiðini at bøta um hesi viðurskifti. Við vistarheiminum fylgir eitt stórt grundøki, sum gevur góðar møguleikar fyri útbygging ella aðrari bygging, tá tað kemur til eldrarøkt.

– Vistarheimið, sum kommunan hevur keypt, eitur Føroya Visarheim, og tí eru búfólk uttanfyri kommununa eisini har, sigur Marja Lamhauge, formaður í sosialu nevnd í Runavíkar kommunu.

– Nú verður Vistarheimið so gjørt kommunalt, og harvið fáa vit 10 tey fyrstu kommunalu eldraplássini í Runavíkar kommunu. Sum er nú búgva 10 fólk á heiminum, og tað ætla vit at halda fast við. Vit eru í holt við at fylgja upp á eldraøkinum í Runavík, tí tað hevur ikki verið gjørt so nógv við.

Við at keypa Føroya Vistarheim so verður eldraumráðið í Runavík so at siga samlað á einum staði. Eitt sindur omanfyri liggur Ellisheimið, og um bygt verður afturat, so verður helst bygt á økinum rundanum vistarheimið.

– Ætlanin er at lata upp kanska síðst í hesum árinum ella fyrst í næsta ári, sigur Marja Lamhauge.

– Men vit hava lovað, at tey búfólkini, ið eru har nú, verða ikki koyrd út fyrr enn tey hava fingið annað pláss at vera í. Hetta verður helst í august-september í ár. Síðani skulu onkrar umvælingar gerast, men onki dato er sett á nær heimið letur upp.

Føroya Vistarheim liggur í friðarligum og náttúruvøkrum umhvørvi í Runavíkar kommunu, beint norðanfyri Toftavatn.



*Runavíkar kommuna hevur nú keypt Føroya Vistarheim, sum nú verður til eitt kommunalt vistarheim*

*Mynd: Edvard*

Títtlingarnir:

## Vit vilja standa saman...

**... vit vilja gera okkara besta. Soleiðis ljóðar loysanarorðið hjá títtlingunum. Og títtlingarnir hjá KFUK skótunum í Føroyum fylla 70 ár Kristi himmalferðardag. Sama dagin eru 74 ár liðin síðani KFUK skótarnir byrjaðu í Føroyum**

SKÓTALÍV
*Ingrid Bjarnastein*

Tað var Henrietta Hansen, KFUK-ari, sum kendi til skótaarbeiði í Danmark, ið helt, at føroyskar gentur skuldu fáa møguleikan at gerast skótar.

9. maj, sum er Kristi himmalferðardagur, eru 74 ár liðin síðani KFUK skótarnir byrjaðu í Føroyum, og fýra ár seinni kundu tær 8–10 ára gomlu eisini gerast skótar. Hetta var byrjanin til títtlingarnar, sum í ár sostatt gerast 70 ár. Av teimum fyrstu, sum vóru við í hesum títtlingaflokki kunnu nevnast Jona Henriksen, Atlanta Weihe og Ester Djurhuus.

Sum nakað nýggjari, so byrjaðu spírur fyri tveimum árum síðani. Hetta eru 6 og 7 ára gamlar gentur. Tilsamans eru 135 spírur, títtlingar, skótar, ungdómsskótar, leiðarar og 4. grein limir hjá Havnar KFUK skótum í ár.

Nú títtlingarnir fylla 70 verður skipað fyri serligum tiltaki sjálvan føðingardagin. Tann fyrri parturin av degnum verður fyri skótarnar, har byrjað verður við guðstænastu og síðani verður farið til døgurða á Hotel Hafnia. Aftaná verður postarenning fyri allar skótarnar og frá klokkan 15.00 byrjar tiltakið alment. Tá verður fagnaðar dagur, har øll kunnu koma at fáa sær kaffi og lagkøku, og harafturat verður ymiskt skótavirksemi til børnini. Loppumarknaður, bomm- og køkutombola verður eisini á skránni.

Klokkan 18.00 verður endað við báli á KFUK-trøðni, har felagssangur og okkurt undirhald verður.



# Tolið uppi á Tvøroyri

VERKFALLIÐ
*Eirikur Lindenskov*



*– Nú er tolið uppi, sigur Finnleif Guttesen*

Nú er tolið hjá borgarstjóranum á Tvøroyri uppi í sambandi við verkfalli hjá Skipara- og Navigatørfelagnum. Hann hevur í dag sent Fíggjarmálastýrinum, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Strandfaraskipum Landsins skriv, har hann krevur, at loysn fæst á málinum, og at sersáttmáli verður gjørdur fyri Smyril, so hann ikki verður lagdur, hvørja ferð verkfall er.

– Tá eingi útlit eru til, at arbeiðssteðgurin skjótt heldur uppat og vísandi til tíðindasendingar í útvarpi og sjónvarpi, har hvørki fíggjarmálaráðharrin ella formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum vilja taka ábyrgd fyri at fáa sambandið við útjaðaran í rættlag aftur, krevur Tvøroyrar býráð hervið av pørturnum, at teir geva tey neyðugu undantøkini beinanvegin, soleiðis at ferjurnar kunnu taka sigling sína uppaftur í stunduni, so serliga útflutningurin, sum øll liva av, men so sanniliga eisini fólkaflutningurin, verður tarnaður sum minst, sigur Finnleif Guttensen.

– Framhaldandi verður kravt, at Smyril fær sersáttmála sum skjótast, soleiðis at hendan støðan ikki kemur fyri aftur, men at skipið altíð siglir óansæð trætur av ymsum slag á arbeiðsmarknaðinum, tí Suðuoyggin er altíð allarringast fyri av slíkum trætum og slíkt góðtaka vit ikki longur. Tolið er uppi.

# Klára seg nakrar dagar afturat

**Endar verkfallið ikki skjótt, kann tað gerast ein vanlukka hjá nógvum bóndrum kring landið**

VERKFALLIÐ
*Áki Bertholdsen*

Endar verkfallið hjá Skipara- og Navigatørfelagnum ikki rættiliga skjótt, kann tað gerast ein fíggjarlig vanlukka hjá nógvum bøndrum kring landið.

Nógv hevur verið tosað um ferðamannasigling, oljutrot og ølflutning undir verkfallinum, men tann samfelagsbólkurin, sum verkfallið kann fáa álvarsligast avleiðingar fyri, eru bøndurnir.

Og einaferð enn eru tað bøndurnir í útjaðaranum, sum eru harðast raktir.

Teir bøndur, sum hava mjólkneyt kring landið, har onki ferðamannasamband er, hava ikki nógv fóður eftir.

Petur Karl av Rana á Tvøroyri, sum hevur 80 neyt, sigur, at hann nøkur tons av fóðuri suður sjálvan valdagin, so hann er ikki tann ið er ringast fyri, tí hann klárar seg í einar 10 dagar afturat.

Hjá nógvum øðrum er støðan nógv verri, tí teir hava bara fóður til nakrar heilt fáar dagar afturat.

– Hetta er ein ruðulleiki, verður stutt staðfest á fóðurdeildini hjá MBM í Kollafirði.

Haðani verður sagt, at tey gera, hvat tey kunnu, fyri fáa fóður út til bøndurnar, men tað gongur strævið og tað er ongin trygd fyri, at tað eydnast.

Bjørn Patursson, formaður í Bóndafelagnum, ásannar, at støðan er við at gerast rættiliga álvarslig hjá nógvum bøndrum við mjólkneytum.

– Koma teir at mangla fóður, so at kúnnar ikki fáa tað ískoyti, tær skulu hava, missa tær mjólkina.

– Men tað ringasta er, at missa tær fyrst mjólkina, fáast tær ikki at mjólka líka nógv aftur, fyrrenn tær hava kálvað, hvussu so roynt verður.

Hann sigur, at tað tí rættiliga skjótt kann gerast ein fíggjarlig vanlukka fyri bøndurnir kring landið, sigur Bjørn Patursson.

Hann sigur, at nú fer Bóndafelagið at seta seg í samband við MBM at vita, um tað er nakað, felagiuð kann gera fyri at bøta um støðuna. Men, hvat tað skuldi verið, veit hann ikki.

Útoyggjafelagið hevur ikki viðgjørt verkfallið, hóast tað mestu eru útoyggjarnar, verkfallið rakar. Óla Jákup úr Dímun, sum er fyribils formaður í felagnum, sigur, at tað hevur ikki verið serliga virkið seinastu tíðina, bæði av sjúku og øðrum orsøkum.

Men felagið er heldur ikki formliga stovnað enn, tað er ætlanin at gera í næstum.



*Bøndurnir kring landið kunnu koma skjótt í neyð, tí nú er vandi fyri, at neytini missa mjólkina*

# Skipari á reyðfiskatúri



*Onkur reyðfiskur og onkur brondingur eru fram við*

Tað er stuttligt hjá einum smádreingi at damla fram við landi og fiska reyðfisk og smáfisk eitt góðveðurs-kvøld. Sleppur hann so eisini at stýra bátinum, er næstan einki, sum honum dámar betur enn tað.

Hendan myndin er tikin síðsta fríggjakvøld út fyri Saltnesi. Tað er stilli og slætt sum á gólvinum. Eina løtu andar hann av landnyrðingi, og tá er eitt sindur kølið. Lýggjan er ikki komin í luftina enn.

Onkur reyðfiskur og brondingur er fram við, men ikki er tað nógv. Agnið er fesk gágga og sild, sum Páll og Jógvan Hans Jakku áttu niðri í skúrinum.

Deydligt er fram við landinum. Minni er at fáa, enn tað onkuntíð plagar at vera, men tað ger einki. Smádronginum dámar best at sigla uppaftur, tí tá sleppur hann at stýra.

Roynt verður fyrst á sandeygunum út fyri Saltnesi, síðan á sandbotni heiman fyri vitan á Garðsenda, inni í taranum undir húsunum hjá Frits og at enda stutt innan fyri bátahylin í Oyrunum.

Tá ið siglt verður inn aftur í Oyrahavnina, er smádrongurin troyttur og kanska eitt sindur kaldur, men væl nøgdur við hesar báðar tímarnar á floti.

**-v.**

# Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag aðalfund

TÍÐINDASKRIV

Í mong ár hevur Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag, KLH, havt aðalfund Krists himmalsferðardag. Í ár verður aðalfundurin hildin í Gøtu kirkju kl. 15.00.

KLH er ópolitiskt og hevur til endamál at virka fyri kristiligum sendingum í almenna útvarpinum og sjónvarpinum, og at styðja útvarpið og sjónvarpið í góðum og sømiligum sendingum. KLH vil forða fyri, at útvarpið og sjónvarpið verða nýtt til ósømiligar sendingar og annað, sum ikki er kristnum siði og kristnari trúgv verdugt.

Á aðlfundinum fer Erland Rasmussen at kunna um arbeiðið við andligu sendingunum, sum verða sendar í SVF.



*Uni Næs, prestur í Fuglafirði, er formaður í Kristiligum lurtara- og hyggjarafelag*

Í sambandi við aðalfundin verður eisini alment møti í kirkjuni í Gøtu um kvøldið kl. 18.00, har øll eru vælkomin.